SJÚKRAHÚS VERKIÐ

**Burturtøka av bløðru/cystu á hálsi**

Hetta er ein vegleiðing, hvat hendir tá bløðra/cysta skal takast burtur á hálsinum.

**Áðrenn skurðviðgerðina**

Um hár/skeggvøkstur er har tú skal skerast, verður tað rakað burtur. Tú skalt sjálvur barbera tær sama morgun sum tú skal undir skurð, tí tá kann leggjast ein skurður á sterila húð og steril ábreiðan kann somuleiðis festast.

Royking darvar sárlekingini og kann tí vera atvoldin til eitt vánaligt úrslit av skurðinum. Tí tilmæla vit, at tú gevst við at roykja 8 vikur áðrenn skurðviðgerðina.

Víst verður til Sundhedsstyrelsen: “Rygning og operationer” á www.sundhedsstyrelsen.dk
Søg på rygning og operationer.

**Skurðviðgerðin**

Skurðviðgerðin tekur 1-2 tímar. Aftaná fert tú í viðraking eina løtu áðrenn tú fert á seingjardeild.
Hevur tú tørv á heilivági fyri pínu og vaml, er møguleiki at fáa tað frá starvsfólkunum.

**Eftirsjúka**

Tað kunnu koma blóðsamlingar og bruni í sárið, men tað er sjáldan.

**Eftir skurðviðgerðina**

Eftir skurðviðgerðina kann tað henda, at tú fært eina tunna plastikslangu (dren) festa í húðina nær við skurðin. Drenið hevur til endamál at súgva blóð og yvirskortvevnaðarvætu burtur frá skurðinum. Tað verður sett eitt plástur oman á penturnar. Aloftast er bert lítil pína eftir skurðviðgerðina.
Sig til um tú hevur brúk fyri onkrum fyri pínu.

Skurðlæknin kemur vanliga seinni at fortelja frá skurðviðgerðini, og tú skal til kontrol dagin eftir, har mett verður um drenið skal takast, og um tú kanst útskrivast.

Tú fært tíð til kontrol á Oyrnadeildini eftir avtalu við skurðlæknan, og til svar uppá royndirnar, sum vanliga verða tiknar undir skurðviðgerðini.

**Fyrivarni/Góð ráð**

- Sjúkramelding verður eftir avtalu við skurðlæknan.
- 1 døgn eftir at drenið er burturbeint, tolir sárið vatn í sambandi við bað
- Plástrið skal ikki rørast áðrenn kontrol, og skal dekkast til undir brúsubað
- Fyri at arrið skal lekjast so væl sum gjørligt, eigur tú at verja tað móti beinleiðis sól í 1 ár. Nýt sólfaktor 50.

Hevur tú spurningar til okkara á Oyrna-nasa-hálsdeildini, ber til at ringja yrkadagar millum kl. 10:00- 12:00   á tlf.: 304622

Okt. 2025

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo
ls.fo